# Ganga í fótasporum gleðinnar

**RØTT JÓL** – Lat okkum ganga í fótasporum gleðinnar og gleða hvønn annan, hugna okkum saman við okkara kæru og hvørjum øðrum og gera jólastákanina í einum umhugsnum og uppbyggjandi kærleiks anda, segði Kristina T. Larsen, tá hon fyrr í mánaðinum helt røðu í samband við at jólatræið á Hellunum varð tendrað 1. sunnudag í advent



VÆTTRAR

*Meðan fólk hugnaðu sær við jólasuppu í Bønhúsinum, gingu vættrar runt og bjóðaðu fólki karamellur*

Snorri Brend
Myndir: Jórun Eið Johannesen

**Hellurnar:** - Nú á døgum halda vit adventstíðina við at stása upp, geva kalendaragávur og ganga til jólafrokostir, jólakonsertir, jólafestir, jólatónar og mangt annað, vísti hon millum annað á í røðuni.

Og Kristina T. Larsen, sum er býráðslimur í Fuglafjarðar kommunu, her Hellurnar eisini hoyra til, helt fram:

– Hetta er helst orsøkin til, at vit brúka alskyns litir í adventstíðini. Alt er mikið hugnaligt og meint í allarbestu meining, og tað eru nógv góð tiltøk, ið verða sett á skrá, í tíðini meðan vit bíða. Vit stákast og fara til ymisk jólatiltøk - alt gott um tað, tó at mær tykir, vit ofta renna meira, enn vit bíða, og at vit renna meira, enn gott er fyri okkum.

– Vit kundu valt at skunda okkum spakuligari. Vit kundu valt, at givið okkum meira far um, hvat advent er og grunda yvir, hvat vit veruliga bíða eftir, og hvønn tað er vit bíða eftir at hátíðarhalda.

– Vit kundu valt at gingið meira í fótasporum gleðinnar og glett hvønn annan og hugna okkum saman við okkara kæru og gjørt jólastákanina í einum umhugsnum og uppbyggjandi kærleiks anda.

– Vit, ið standa her runt træið á Hellunum, eru øll komin her í dag, fyri at verða við til at byrja jólahugnan og at tendra ljós í myrkrinum. Vit hava ta áskoðan, at ljósið í myrkrinum gevur eina yndisliga fløvandi kenslu í barmi.

– Tað er hesa yndisligu og fløvandi kensluna, ið vit fegin vilja kveikja varandi lív í, hiðani frá og fram til jóla. Og tað er henda yndisliga og fløvandi kenslan, ið vit kunnu velja at geva víðari til onnur: Ein neista av heilsan, ein neista av vinarligum eygnabrái, ein neista av tíð og ein neista av samveru.

– Lat okkum ganga í fótasporum gleðinnar og gleða hvønn annan, hugna okkum saman við okkara kæru og hvørjum øðrum og gera jólastákanina í einum umhugsnum og uppbyggjandi kærleiks anda, segði Kristina T. Larsen at enda í røðu síni, tá jólatræið á Hellunum varð tendrað.



BÍÐITÍÐ

*- Bæði Jesaja og Jóhannus doyparin peikaðu á Jesus, ið var hann "sum koma skuldi". Hetta vísir okkum á týdningin um, at adventstíðin er ein fyrireikingartíð ella ein bíðitíð, har vit gera okkum klár til tað ella til tann, sum skal koma: Nevniliga jólini og Jesus, segði Kristina Larsen í røðu síni, tá jólatræið á Hellunum varð tendrað*



TÓNLEIKUR

*Undir blásarar úr Fuglafjarðar Hornorkestri spældu hugnaligar jólatónar*

21
Á Sjókaféini
ber til at keypa døgurða
allar gerðandisdagar
Kalt borð, smyrjibreyð
og 3 rætta menu

Sosialurin 341800
Harumframt kann hølið býleggjast til
Jólaborhald, brúdleyp, veitslur og onnur tiltøk
SJÓKAFÉIN
Fjøruvegur 3, Runavík, tel. 449181